NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

900 ára føðingardagar í Rituvík

Leygardagin 21. august 2004 hittust børnini hjá Elspu og Magnusi á Líðini við øllum sínum til ein felags føðingardag. Tey 12 systkini fyltu 900 ár 6. september. Harry, einum beiggja, bar ikki til at koma

Myndir: AWJ-Foto

Dagurin byrjaði við kirkjugongd í Rituvíkar kirkju kl. 12.00. Aftaná vórðu myndir tiknar, og so varð farið á grøvina hjá mammuni, sum er grivin í Rituvík. Hon doyði í 1978.

Ávegis til Leivíkar var støðga á við grøvina hjá pápanum, Magnusi Olsen, eisini nevndur Magnus í Rituvík. Hann doyði í 1940 og er grivin á Glyvrum, tí tá var eingin kirkjugarður í Rituvík.

Kl. 15.30 var borðhald í Bygdarhúsinum í Leirvík. Her var ymiskt á skránni, felagssangur, kórsangur, og langommu- og langabbabørnum hjá Elspu og Magnusi sungu. Eisini sungu tey 11 syskini.

Fleiri røður vórðu hildnar og upplestur var av søguligum tilfari, sum familjan hevði savnað.

Gamlar myndir vórðu eisini vístar.

Systkini úr Rituvík sum hildu 900 ára føðingardagin.
Aftara rað f.v: Wenzil Olsen, Rituvík, Karl Olsen, Rituvík, Arne Olsen, Esbjerg, Arnholt Olsen, Rituvík, Magnus Olsen, Runavík, og Jaspur Olsen, Vestmanna.
Fremra rað f.v.: Amy Tausen, Tórshavn, Elly Højgaard, Rituvík. Sára Olsen, Rituvík, Marin Højgaard, Rituvík, og Mary Hansen, Nes Eysturoy.
Harry Olsen, sum býr í Esbjerg, vantar á myndini

Umleið 180 fólk vóru í Bygdarhúsinum í Leirvík

Langommu- og langabbabørnum hjá Elspu og Magnusi syngja

Durita Tausen úr Havn var eina av fyrireikarunum

Jaspur Olsen las lestur í kirkjuni í Rituvík

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hjalmar Waag Høgnesen 75 ár

Í dag, hósdagin 9. september, fyllir Hjalmar Waag Høgnesen í Klaksvík 75 ár.

Hjalmar er sonur Turid Waag, ættað úr Tunghúsinum í Vági í Klaksvík, og Joen Magnus S. Høgnesen, ættaður úr Leirvík, ið var stýrimaður á skonnartini Ernstinu, sum gekk burtur í 1930.

Turid og Joen Magnus fingu fýra synir. Hjalmar er yngstur, hinir brøðurnir eru Hjørleiv, Símun og Rólant. Hjørleiv og Símun eru búsitandi í Klaksvík, og Rólant, sum doyði fyri nøkrum árum síðan, búði í Danmark.

Í 1965 giftist Hjalmar við Sybillu Gardar, dóttir Petru og Hugo Gardar.

Tey búsettust á Eiðinum ella við Nýggjaveg, sum gøtan eitur í dag. Tey fingu fimm børn, døturnar Turid og Gunhild og synirnar Gardar, Joen Magnus og Eyðun.

Sum ungur fór Hjalmar til skips, hann sigldi m.a. við skonnartini "Polo" og trolaranum "Jóannes Patursson". Nøkur ár arbeiddi hann á flakavirkinum Nordafar í Føroyingahavnini.

Hjalmar tók skipara-prógv á Klaksvíkar Sjómansskúla í 1950, og var hann í 26 ár skipari á postbátinum Barsskor, ið sigldi millum Klaksvík, Kunoy og Kallsoy. Hann var skipari á Barskor frá 1970, til hann fór frá vegna aldur í 1996.

Hjalmar hevur yrkt og umsett fleiri sangir og sálmar, og hansara frítíðarítriv hevur verið at fotografera.

Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini Gunhild og versoninum Andrias Arge, Garðsendi 24, Klaksvík.

Hjalmari verður ynskt hjartaliga tillukku við degnum.

Samrøða verður við Hjalmar í Sosialinum leygardagin 11. september.

Dagurin

9. september. Gorgonius, deyður umleið ár 300. Ein av pínsluváttunum í fornkirkjuni, sum varð tikin av døgum undir Diocletianus keisara.

Nýggjur sølustjóri

Nýggi sølu- og marknaðarstjórin í Smyril Line er 30 ára gamal og útbúgvin cand. merc. í altjóða marknaðarførslu og leiðslu

SMYRIL LINE
tíðindaskriv

Smyril Line hevur sett 30 ára gamla Hendrik Egholm av Glyvrum í starvið sum sølu- og marknaðarstjóri hjá felagnum.

Hendrik Egholm er útbúgvin cand. merc. í altjóða marknaðarførslu og leiðslu á handilsháskúlanum í Keypmannahavn.

Hann kemur úr einum leiðandi starvi á sólorkudeildini hjá altjóða fyritøkuni, VELUX, sum m.a. er kend fyri at framleiða vindeygu og útgerð til sólorku. Frammanundan arbeiddi hann við strategiskari marknaðarførslu og sølu, hjá ráðgevandi lýsingafyritøkuni, INTEGRAL, í Keypmannahavn. Har starvaðist hann við verkætlanum í Danmark, Evropa og Asia, sum eitt nú fevndu um hvítvørur, HI-FI-vørur, brúkslutir og matvørur. Harumframt hevur nýggi sølu- og marknaðarstjórin hjá Smyril Line eisini arbeitt við strategiskari sølu hjá ráðgevandi grannskoðarafelagnum, Deloitte, í Keypmannahavn.

Hendrik Egholm er giftur við Anniku á Steig Egholm úr Hoyvík, og tey eiga eitt barn.

Ivan Johansen Bilar:

Einasta ISO góðskugóðkenda bilasøla heldur góðskustøðið

Nøgd starvsfólk og leiðsla hjá Ivan Johansen Bilum

Mynd: Jens Kristian Vang

TÍÐINDASKRIV

Sp/f Ivan Johansen Bilar, sum var fyrsta bilasøla í Føroyum sum fekk DS/EN ISO 9001:2000 góðskuskipan, fekk týsdagin 7. september 2004, endurskoða sína skipan av Det Norske Veritas í Føroyum. Staðfestast kundi at einasta ISO góðskugóðkenda bilasøla í Føroyum framhaldandi heldur góðskustøðið, og enntá hevur hækkað góðskstøðið.

Ásetingarnar í góðskuskipanini áseta m.a. at skipanin skal endurskoðast (endurcertifiserast) einaferð um árið - fyri at tryggja góðskustøðið - starvsfólkið og serliga viðskiftafólki at gagni.

Ivan Johansen Bilar hevur, sum einasta bilasøla í Føroyum, seinasta árið arbeitt undir **DS/EN ISO 9001:2000 góðskuskipanini -** og týsdagin 7. september var tíðin komin, at umboð fyri Det Norske Vertias (DNV) í Føroyum kom á gátt fyri at endurskoðaðu skipanina.

Eftir gjøgnumgongd av mekaniska verkstaðnum, bilasøluni, goymsluni og DINITROL rustviðgerðini kundi staðfestast, at Ivan Johansen Bilar heldur ásetingarnar og hevur enntá hækkað góðskustøðið á summum økjum.

Skipanin fevnir um alla fyritøkuna frá starvsfólkapolitikkinum til kunda tænastustøðið.

Leiðslan og starvsfólk fegnast um góðskustøðið, og eingin ivi er um, at hetta gagnar bæði starvsfólkatrivnaðinum og viðskiftafólkunum hjá Ivan Johansen Bilum.

Sum einasta ISO góðkenda bilasøla í landinum setur hetta krøv til Ivan Johansen Bilar, sum umboðar Citroén, Chrysler, Merceds Benz, Mitsubishi umframt DINITROL-rustviðgerð, og staðfestast kann, at Ivan Johansen Bilar lýkur krøvini, sum eru ásett í DS/EN ISO 9001:2000 góðskuskipanini.

---

†

Kunngjørt verður at mín elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

Thomas Arge
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 6. september, 66 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 9. september kl. 13.00.

Familjunnar vegna

Sólrun
Hildur, Fía og Regin

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at

Else Bonke Kristiansen

andaðist tann 30. august.

Jarðarferðin verður frá Søndermarkens Lille Kapel leygardagin tann 11. sept. kl. 13.00.

Familjan